Ferðavinnufelagið

FYLGISKJAL 2

Samferðslumálaráðið
Postboks 64
110 TÓRSHAVN

Att.:

Tórshavn 4. februar 2019

Okkara tilv./Our ref.:
/Samfer-Ferxa-H

Tykkara tilv./Your ref.:

## Hoyringssvar

Vinnuhúsið fekk 28. januar uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólka- og farmaflutning til hoyringar.

Uppskotið snýr seg um at leingja útbjóðingina av rakstrinum av Bygdaleiðum frá fimm til sjey ár. Talan er um eina broyting til tað betra, tó hevði størri høpi verið í tí, um útbjóðingin var longd til átta ár, tí avskrivingartíðin á einum bussi er átta ár. Tá høvdu sáttmálatíðarskeið og avskrivingartíðarskeið verið samanfallandi, soleiðis sum uppskotið leggur upp til.

Tað skal leggjast afturat, at Strandfaraskip Landsins setur sum krav, at bussarnir ikki mugu verða meira enn sjey ár. Besta loysnin fyri allar partar hevði verið, um til bar at koyra við bussunum tvey ár eftir, at teir eru avskrivaðir.

Samferðslumálaráðið hevur eisini sent lógaruppskot hoyringar um heimild til at gera reglugerð fyri koyri og hvílitíðir í Føroyum. Ferðavinnufelagið skal gera vart við, at ein tílík reglugerð broytir fortreytirnar á flutningsmarknaðinum í ein so stóran mun, at greiða má verða á í útbjóðingartilfarinum um nýggj reglugerð fer at verða sett í gildi í sáttmálaskeiðnum.

Vinarliga
**FERÐAVINNUFELAGIÐ**

Birita Johansen